## DAGSINS MEINING

# Samhaldsfesti standa sína roynd

Uppskot Sambandsfloksins um at seta 800 milliónir afturat í Samhaldsfasta tey næstu árini er sera áhugavert. Tað mest áhugaverda er, at tað tykist nú verða ein tryggur meiriluti á Føroya Løgtingi fyri samhaldsføstu skipanini, ið sostatt skuldi havt eitt trygt lív lagað.

Sambandsflokkurin tekur nú undir við Samhaldsfasta Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, og Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin eru sum kunnugt upphavið til grunnin, so har burdi allarhægst verið talan um smájusteringar um nakað. Hettar merkir, at ein meiriluti á Føroya Løgtingi átti at kunnað tikið undir við hesum uppskoti, ið er hópin betri enn uppskotið hjá Fólkaflokkinum og Sjálvstýrisflokkinum. Ein tvungin ratupensión fyri øll, har háinntøka gjøgnum lívið merkir hápensión og láginntøka gjøgnum lívið merkir lágpensión er fult í tráð við Fólkafloksideologiina, har hvør er sær sjálvum næstur, og kann sjálvsagt ikki góðtakast av flokkum, ið ideologiskt eru vinstrumegin Margaret Thatcher.

Tjóðveldisflokkurin sær eisini í hesum málinum út til at vilja ofra alt á fullveldisaltarinum. Teir siga, at teir ganga inn fyri einari samhaldsfastari skipan, men kunnu ikki taka undir við uppskotinum um at víðka samhaldsfasta. Hava teir nakað at seta í staðin? Svarið er og verður nei, tí ein pensiónsskipan, ið Óli Breckmann og Fólkaflokkurin kunnu taka undir við verður aldrin ein samhaldsføst skipan.

Hevur Fólkaflokkurin sett Tjóðveldinum stólin fyri dyrnar í hesum málinum? Tað kundi sæð soleiðis út, tí sjáldan hevur argumentatiónin verið so tunn hjá formanni tjóðveldisfloksins, sum tá hann greiddi Føroya Fólki frá, at teir taka undir við einari samhaldsfastari skipan, men bara ikki tí einastu, ið er í uppskoti.

Tíverri sær út til, at ein breið semja um eina pensiónsskipan, ið allir flokkar uttan Fólkaflokkurin áttu at kunnað tikið undir við, verður forðað av Tjóðveldisflokkinum. Sterku røturnar í fakfelagsrørsluni síggja ikki út til at gera mun hjá nýggju leiðsluni í Tjóðveldisflokkinum, ið hevur ein løgnan eginleika at forða fyri breiðum semjum og at lata søguligar møguleikar gleppa av hondum. Her er ein søguligur møguleiki at gera eina varandi semju tvørturum miðjuna í føroyskum politikki um pensiónsspurningin – vónandi gleppur hesin ikki av hondum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Óføroyskt, ómentað

**Heri Mohr**



Einaferð í fjør fekk hvørt mansbarn í Føroyum eina avís ókeypis í hondina. Soleiðis varð øllum føroyingum fráboðað, at hon – avísin – fór skjótt at verða borin í heim. Av genetiskum eginleikum fingu vit millum annað at vita, at fostrið ikki hekk í nøkrum politiskum nalvastrongi.

Hesin trivaligi nýføringur vísti seg frá fyrsta degi at vera ein forheðraður buldribassi, sum so at siga beinanvegin kvetti tann ópolitiska nalvastrongin av og tveitti hann á bláman.

Óflongdum vargum líkt er onki heilagt í teirra verð. Eitt nú er ongin trupulleiki at skriva niðrandi um fólk, sum í mong ár hava ligið undir grønu torvu, tað gongur so lætt sum fretur eftir gleri. Hóast tað kann órógva og særa eftirkomarar (abbabørn o.fl.), nervar tað ikki slíkt »flogvit«.

Hetta gevur orsøk til at endurprenta brot úr tí, sum Andr. Samuelsen (Sámalsson) skrivaði í Føringatíðindi 5. september 1900 við heitinum »Føringar og teirra frændir«:

»Hvat Førjafólk følir og vil gera fyri at sambandið millum Førjafólk og danska fólkið kann verða betri og inniligari í framtíðini enn nú, er ikki gott at vita. Nógv av okkum halda, at sambandið er gott sum er, og at einans saknast meiri samverð hjá fólkunum hvørt við annað og betri kennskapur ímillum okkara. Tað er sjálvsagt, at Føringar kenna eitt sindur meiri til danska fólkið, enn tað til Førjafólk, tí vit hava brúkt og livað av tí danska litteraturinum og gera tað enn. Fleiri av Føringum meina, at eitt gott samband einans kann koma í lag, um Føringar leggja allar árar út fyri at verða so nógv Danskarar í sinni og skinni sum møguligt. Hetta má eg halda vera skeivt. Fyrst og fremsti haldi eg, at vit mugu halda uppá at vera okkum sjálvi – vera Føringar í sinni, tí annars trúgvi eg ikki at tað kann løna seg fyri Danskarar – danska fólkið – at arbeiða fyri einum betri og grundigari kenskapi til Føringar, og ivaleyst vilja allir teir Danskarnir, sum her vóru, siga mær rættin til í hesum. Vit mugu royna at strevast fyri at koma alt longri og longri fram í andligum og kroppsligum sjálvbjargni hvør einstakur og fólkið yvir høvur. Vit mugu halda fast og trúliga við okkara tjóðskap og okkara mál og ongantíð gloyma, av hvørjum runni vit eru sprotnir. Hetta má og kann ikki missfatast sum strevan fyri at koma leysir frá Danmarki, ella strevan fyri at steingja seg inni frá øllum teimum nýggju rørslunum, sum fyrifarast uttanfyri okkum. Vit eru jú langt síðani komnir burtur frá slíkum ørvitistosi, sum ongantíð hevur verið meint av teimum, sum hava strevast fyri framgongd hjá Førjafólki og unt tí væl.

Vit mugu strevast fyri at læra at kenna alt tað góða hjá øðrum fólki, sum vit kunnu hava nyttu av at taka eftir. Vit kunnu her í flest øllum bara fara til okkara frændar Danskarar. Fá fólkasløg standa fremri enn tað danska í útviklingi. Tá ið vit nú føla, at Danskarnir seta prís uppá okkum og okkara land, so má ivaleyst harav vakna og treystna tann fosturlandskærleika, sum býr í okkum og sum er okkara besti fedraarvur, og mana okkum til at strevast so, at hesin lítli pletturin úti í atlantshavinum, sum vit kalla okkara fosturland og sum er okkara fosturland, má koma so langt fram, at vit ikki nýtast at skammast at hoyra til eitt framburðsland sum Danmark. Og fosturlandskærleikin vil mana okkum til at strevast so, at fólkið í útviklingi – kroppsligum og andligum – ikki skal standa aftanfyri okkara brøður. Okkara land vil aldrin á allan hátt kunna javnlíkast við Danmark, tað fora viðurskiftini fyri, men longu nú kunnu Danskarnir síggja við virðing til Førjafólk, hvat ymsum greinum av vinnuvegum okkara viðvíkir sum t.d. fiskiskapur og handil.

Eg vildi ynskt, at studentaferðin til Førjar skuldi drigið nógvar slíkar aftaná sær, og eg vildi ynskt, at hendan, ið var, má hava virkað til, at Føringar ein sum allir lova sær sjálvum og sínum fosturlandi, at tá ið studentar frá Danmark eina tíð hereftir koma í flokki aftur til Førjar, teir tá skulu undrast yvir, at landið hevur fingið slíka framgongd. Væl er okkara land fátækt í ymsar mátar, men um Føringar við øllum sínum vilja og av allari megi í fosturlandskærleika vilja løna sínum fosturlandi sum góð børn móður síni, so er landið ikki fátækt«.

Nú kann so ein og hvør gera sína meting um, hvat er óføroyskt og ómentað; tað, ið varð skrivað fyri 100 árum síðan, ella tað, sum í hesum døgum verður skrivað í einum reivlingi í tí føroyska blaðheiminum.

## Ein heilsan til genturnar á Bliki

*Vit eiga døtur sum mergur er í,*
*á ólavsøku vunnu tær tí,*
*á ósløttum bylgjum í vindi og regni,*
*tær kempa seg fram og vísa sítt hegni,*
*eftir fjørðinum grøva seg stavn fyri stavn,*
*til endans at koma fyrstar í havn.*

Hjartaliga tillukku ynskir

**ein stolt mamma**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

800 Milliónir til Pensionistar

# – Gevur bert ein 1000 kr seðil aftrat um mánaðin

**Jákup Fróði Djurhuus**



Tað skal øgiliga nógvur peningur til at reka samfelagið Føroyar.

Uppskot sambandsfloksins um at seta risaupphæddina uppá 800 mió kr í ein grunn til at hækka pensiónina við, vísir fremst av øllum, hvussu nógvur peningur í skal til at reka samfelagið, soleiðis at eisini tey gomlu fáa eitt lítið sindur betri umstøður.

Sjálvt um henda risaupphædd uppá 800 mió kr verður samtykt, so kemur tað í besta lagið at geva teimum stívliga 6000 pensionistunum ein 1000 kr seðil aftrat um mánaðin.

Landsstýrismaður Fólkafloksins sigur, at hesar 800 mió kr muna onki hjá pensionistunum, samstundis sum hann raðfestir yvirtøkuna av flogvøllinum og fólkaskúlanum framum pensionistarnar.

Um ikki annað, so sigur hetta nakað um, hvussu stutt samgongan er rokkin, tá talan er um at geva pensionistunum sømilig kor.

Omaná skal samgonngan lækka blokkin við einum 350 mió kr, og loysa frá Danmark, samstundis sum teir tosa um at byggja ferjur, undirsjóvartunlar og ellisheim, og bjóða oljukekkar út til Guð og hvønn mann eftir grindabýtinum.

# Hvar var SVF ??

**Tordur J. Niclasen**



Undrunarsamt var tað, at SVF ikki var møtt, tá føroysku svimjararnir komu heimaftur úr Svøríki mánadagin 6. august við ikki færri enn 7 heiðursmerkjum.

EM-kappingin í svimjing fyri rørslutarnað endaði sunnudagin í Stokholm.

Tær komu heimaftur sum hetjur. Heidi Andreasen, Eiði 4 gull og 1 bronsumerki. Esther G. Hansen, Tórshavn við 2 bronsumerkjum.

Í kapping við 38 lond gjørdist Heidi 4 ferðir sigurskvinna, hon setti eitt europeiskt met og so sannuliga eisini eitt heimsmet!!

Mánadagin 2. august stóðu tær saman á sigurðsskamlinum – onnur á fyrtsa plássi , hin á triðja plássi. Ein stoltleiki fyri føroysku tjóðina!

Heimaftur komnar vórðu tær fagnaðar. Skipað var fyri samkomu í Gundali og var hetta av sonnum ein hátíðarløta.

Seinri á kvøldi vóru tað eiðsfólk, eini 300 komin saman á Vaglinum – sum heiðraðu bygdagentuni fyri avrik hennara. Ein sonn hátíðarløta!

**Accociated Press, men ikki SVF**

Á hátíðarløtuni í Gundali var sjónvarpsmaður, men hesin var ikki føroyingur ei heldur umboðaði hann Sjónvarp Føroya. Hesin var frá Associated Press. Umframt upptøku av tí sum fór fram, hevði hann eisini samrøðu við hetjurnar báðar og frálíka venjara teirra.

Mong við mær mundu helst undrast yvir, hví SVF ikki var á staðnum!?

Nú er tað ikki gamansleikur hjá ”leikmanni” at gera vart við seg og siga hvat SVF ”eigur” at senda. Tí niðurstøða teirrasa er sum ofta hon, at ”tað er ein journalistisk meting, hvat ið sendast skal – og hesa metingina gera vit sjálvi...”

**Hvat hevur tíðindavirði?**

Loyvi mær allíkavæl at spyrja tykkum, hví vóru tit ikki á staðnum ? Tað at hesar vóru heimaftur komnar við ikki færri enn 7 heiðursmerkjum, hevði tað einki tíðindavirði – ella er tað nakað sum hendur dag og dagliga? Tað at tann eina setti europeiskt met umframt heimsmet, hevði tað heldur ikki nakað tíðindavirði – ella er tað nakað sum føroyingar gera dag og dagliga?

Havandi 20 min. longu tíðindasendingina frá týsdegnum 8 august í huga, so er einki at ivast í, at okkurt av tí, ið har var sent kundi vikið fyri stórhendingini í Stokholmi.

Tað er ílagi, at at nakrar hugnaligar myndir verða sendar av grindadrápi har 23 hval leggja beinini, men at ein ”heil bygd” kemur saman at heiðra persóni, sum hevur umboðað Føroyar so heiðurliga, tað er í hugaheiminum hjá teim flestu ein størri hending.

Vónandi taka tit ikki henda spurning illa upp, men geva eina sakliga frágreiðing um hví tit einki gjørdu burturúr hesi stórhending?

Innilig áheitan á Tórshavnar býráð:

# Gerið rennibreyt um Tórsvøll!

**Sølvi Reinert Hansen**

Í seinastu viku frættist í Degi og viku, at ætlanir nú eru frammi at gera hølir til innivist undir sitiplássunum við sunnara enda av Tórsvølli. Um henda ætlan verður framd, er hetta fyribils seinasta kapittul í harmiligu søguni um tjóðarítróttarvøllin Tórsvøll.

Seinasta summar samtykti tásitandi býráð, at rennibreyt ikki skuldi gerast um Tórsvøll. Henda avgerð varð tikin, hóast kanningar vístu, at við at taka tvey tey niðastu røðini av sitiplássum við ovaru síðu av Tórsvølli burtur, og við at flyta sitiplássini við sunnara enda nakað, fekst ein rennibreyt um Tórsvøll. Hetta arbeiðið hevði kostað uml. 8-9 mió.

Býráðið samtykti samstundis, at annað økið skuldi finnast til frælsan ítrótt í høvuðsstaðnum. Býráðið gjørdi av at seta eina millión av um árið í trý ár til hetta endamál. Um øki til frælsan ítrótt verður gjørt aðrastaðni, má kostnaðurin metast at liggja um eina 20 mió. Hvar er logikkurin?

Eg ivist ikki í, at flest allir borgarar í Tórshavn heldur sóu tær 10 mió. eyka, ið ein rennibreyt aðra staðni kostar, nýttar til okkurt annað enn eitt nýtt stadion í høvuðsstaðnum.

Øll mentanarnevndin hjá býráðnum var í 1999 á Gotlandi til oyggjaleikir. Endamálið var at eygleiða oyggjaleikirnar, so Havnin kundi bjóða seg til at vera vertur fyri oyggjaleikunum í 2005. Tað, sum spurdist burturúr, var m.a. avgerðin um ikki at gera rennibreyt um Tórsvøll. Hetta hóast Oyggjaleikanevndin hevur boðað frá, at hon helst vil, at meginparturin av ítróttinum á oyggjaleikum er savnaður á einum staði.

Hóast megnar avrikið við at gera øki til frælsan ítrótt á Svangaskarði til oyggjaleikirnar í 1989, kann hetta tí ikki metast at vera nøktandi, um oyggjaleikir skulu haldast í Føroyum aftur. Annars kann nevnast, at einki øki finst til altjóða kappingar í spjótkasti, sleggjuvarpi og klingruvarpi í Føroyum. Økið á Svangaskarði varð jarðað undir grasvøllinum á Toftum.

Tað er enn ein gáta, hvussu býráðið seinasta summar kundi taka ta avgerð, at rennibreyt ikki skuldi gerast um Tórsvøll, men heldur aðra staðni í høvuðsstaðnum. Teir fáu einkultpersónarnir, ið ikki vildu hava rennibreyt um Tórsvøll, hava enn ikki víst á nøkur saklig argument fyri hesum. Sæð út frá einum ítróttarligum, búskaparligum og byggi- og býarskipanarligum sjónarmiði er Tórsvøllur einasta staðið at byggja rennibreyt.

Nærum øll ítróttarfeløg og skúlar í høvuðsstaðnum hava fyrr heitt á býráðið um at gera rennibreyt um Tórsvøll. Umframt at øki til frælsan ítrótt finnast í samband við stadionøki í øllum størri býum, hava hesi ítróttarfeløg og skúlar sæð tað gagnliga í frælsa ítróttinum. Hann er til bata fyri heilsuna hjá fólki sum heild og til bata fyri allar aðrar itróttargreinar. Eingin, sum hevur sæð annan hálvleik av føroyskum landsdystum í fótbólti kann ivast í, at okkara óføru garpar á fótbóltslandsliðinum kundu notið gott av betri umstøðum til rennivenjing. Til stuttleikar kann nevnast, at ein nú so navnframur David Beckham í fleiri ár var økismeistari í 1500 m renning í sínum aldursbólki.

Samstundis hevði økið bøtt munandi um umstøðurnar hjá teimum uml. 500 børnunum, sum seinasta ár tóku lut í rennikappingum kring landið. Meginparturin av teimum býr í Havn, men enn mugu tey eins og tey vaksnu renna á vegunum í høvuðsstaðnum. Tórsvøllur er stongdur fyri vanliga borgarinum!

Sum rennari og borgari í Havn vil eg tí heita á býráðið um at grípa í egnan barm. Enn ber til at gera Tórsvøll til tað, hann upprunaliga var ætlaður til – ein veruligan tjóðarítróttarvøll.

